e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:

www.sosialurin.fo

# Gullregn í Hollandi

*Fyri fyrstu ferð hava Føroyar havt umboðan í Special Olympics, og ítróttafólkini høvdu fleiri heiðursmerki við sær heimaftur*



*Tá ferðalagið kom aftur um miðdagsleitið mánadagin, varð stórfingin móttøka fyri teimum við ÍSF húsið, har m.a. ÍSF forsetin, Heðin Mortensen førdi fram røðu*

***Mynd: Jens K. Vang***

Jákup Mørk

Í tíggju dagar hava átta føroysk ítróttafólk luttikið í sonevndu Special Olympics, sum í ár varð hildið í Gronningen í Hollandi.

Hans Harryson Hansen, sum var ein av ferðaleiðarunum á ferðini greiður frá, at Special Olympics eru Olympisku leikirnir fyri menningartarnað, og at hetta er fyrstu ferð, at Føroyar hava havt umboðan á hesi ítróttastevnu.

**40 ár á baki**

Talan er um ein altjóða felagsskap, sum varð stovnaður í seksti árunum, og sum sostatt hevur út við 40 ár á baki. Til stuttleikar kann nevnast, at tað var heimsgitna Kennedy-familjan, sum gjørdi hugskotið til veruleika, og síðani stovnanina hava Special Olympics verið hildnir við tvey ára millumbilum. Annað hvørt í Amerika og annað hvørt í Europa.

Eftir at tað í longri tíð hevur verið arbeitt við málinum, sendi ÍSB í oktober mánaði eina umsókn um føroyskan limaskap, og knappar tríggjar mánaðir seinni fingust boð um, at Føroyar høvdu fingið tillutað eina kvotu upp á 8 ítróttafólk. Fýra í frælsari ítrótt og fýra í svimjing.

**Nógvar stjørnur**

Fryi tveimum vikum síðani varð so farið avstað, og ikki kann sigast annað enn, at føroysku luttakararnir fingu eina uppliving fyri lívið.

Hans greiður frá, at alt varð sett upp á stórfingnan hátt, og at setan, móttøka og annað ikki stóð petti aftan fyri Olympisku leikirnar, sum verða hildnir hvørt fjórða ár.

Luttakrarnir sluppu veruliga at kenna seg sum heimsstjørnur í 10 dagar, og umframt luttakararnar, vóru eisini fleiri aðrar heimsstjørnur at hitta.

Millum annað heilsaðu føroysku ítróttafólkini upp á Nadja Commanetch, sum í sjeytiárunum setti eitt heilt nýtt støði fyri altjóða fimleik. Eisini finski rennarin Lasse Viren var at síggja, umframt heimsgitnu fótbóltsleikararnar, Hohan Cruyff og Jean Marie Pfaff, fyri at nevna nøkur nøvn.

**Bólkað**

Kappingin varð skipað soleiðis, at fyrst luttóku øll ítróttafólkini, eini 2.000 í tali, í innleiðandi umførunum, og síðani vórðu hesi flokkaði, alt eftir hvussu tey stóðu seg og hvørji brek tey høvdu.

Á henda hátt varð tryggjað, at munurin millum luttakararnar ikki gjørdist ov stórur, og slagorðið fyri kappingina »lets win together« boðar eisini frá, at her skuldu øll fáa ein møguleika.

Ikki kann sigast annað enn, at tað gekst føroysku luttakarunum væl, og á talvuni á hesi síðu sæðst, hvussu okkara fólk stóðu seg í sínum kappingum.

**Írland 2004**

Hans H. Hansen greiður frá, at um fýra ár, tá leikirnir aftur verða hildnir í Europa, er tað Írland, sum er vertur, og vónar hann sjálvsagt at Føroyar eisini tá fara at luttaka.

2002 verður Special Olympics í USA, og fæst fígging til vegja, er heldur einki at ivast í, at vit eisini verða umboðað í statunum.

Júst hvussu nógv ítróttafólk talan tá verður um, veit Hans ikki at siga. Hann greiður frá, at nú verða eftirmetingar gjørdar av ymsu londunum, soleiðis at støða kann takast til, hvørt kvoturnar skulu minka ella vaksa, men hann væntar tó ikki, at føroyska kvotan verður minni til komandi leikirnar.

Umframt Hans vóru eisini Rakul N. Joensen, Tóra Hansen og Rúni Gaardbo við á ferðini.

## Føroysku úrslitini í Gronningen

**Svimjing**

| | |
|---|---|
| Durita Strøm, Havn | 1 gull- og 1 bronsumerki |
| Halla Poulsen, Fuglafirði | 1 silvurmerki |
| Jimmy Nielsen, Klaksvík | 1 gullmerki |
| Símun Petur Zachariassen, Klaksvík | 4. pláss og 7. pláss |

**Frælsur ítróttur**

| | |
|---|---|
| John Jensen, Skúgvi | 1 gull- og 1 bronsumerki |
| Jonhard Haraldsen, Havn | 1 gull- og 1 bronsumerki |
| Unn Mortensen, Øravík | 1 silvurmerki |
| Johanna Maria Niclasen, Norðoyri | 7. pláss og 8. pláss |

# FM 2000 á Hafnia

*Talv: Avgjørt er at FM umdysturin verður telvdur á Hotel Hafnia. Fyrsta talvið verður í morgin kl. 14.00*



Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Talvsamband Føroya hevur leitað leingi eftir rætta staði til dystin millum IM John Rødgaard, Flóvin Tór Næs og Torbjørn Thomsen. Miðað varð eftir einum sentralum staði í Havnini, og við sera góðum treytum frá miðbýarhotellinum Hotel Hafnia, verður umdysturin leiktur har.

Telvarnir telva í rúmi fyri seg sjálvar, meðan Hafniasamkomuhøllin verður áskoðarrúm. Settur verður upp stórskíggi har talvini verða víst beinleiðis við viðmerkingum. Møguleiki verður eisini hjá áskoðarum at hugna sær við snartalvi og øðrum, eftirsum tað ikki ávirkar ta veruligu telvingina. Ikki bert verða talvini víst beinleiðis á stórskíggja, men eisini kring knøttin verður møguligt at fylgja við. Í samstarvi við Hotel Hafnia verða talvini vist beinleiðis á alnetinum. Meir um hetta á www.sam-teld.fo/talv, og www.hafnia.fo.

Í morgin verða tað Torbjørn og Flóvin sum sessast yvir av hvørjum øðrum. Leygardagin telva John og Torbjørn og hvítusunnudagin leika Flóvin og John tað seinasta talvið.

Um profillýsing skal gerast av hesum trimum telvarum, so kann sigast stutt, at John er ultrapositionellir telvari, hann er sum einasti føroyingur altjóða meistari, er sera ringir at vinna ímóti og hevur nógvar góðar altjóða royndir. Flóvin er sera energiskur telvari, ger nógv við telving og hevur hann vunnið telvarar sum eru styrkismettir hægri enn John. Torbjørn er ”stjørnuskotið” í hesum trýmanshøpi. Eingin hevði væntað at hann kom so langt í ár, men hansara heldur óteoretiska telving knekkaði flestu telvarar í ár.

Hava tit áhugað í telving- ella eru støðd í miðbýnum, støkki so inn á gólvið hjá Hotel Hafnia um vikuskiftið til ein sera spennandi FM dyst.

Umframt Hotel Hafnia hevur Føroya Tele stuðlað tiltakinum.

**Norðoyastevnudysturin og Sting**

Síðani 1997 hava havnarmenn og klaksvíkingar telva liðdystir á ávíkavist norðoyastevnu og ólavsøku. Sum oftast hava heimaliðini vunnið og í ár varð einki undantak. Havnarmenn komu við sterkari manning til Klaksvíkar, men eins og Havnarbáturin á norðoyastevnu so rakk hendan manning ikki ytst til tindars. Heili 6-2 varð úrslitið til klaksvíkingar.

Sting er heimskendur tónleikari, men hugsa kann hann eisini og hevur hann tí bjóða heimsins besta telvara, Gary Kasparov at telva móti sær og sínum tónleikarabólki. Kasparov hevur tikið av tilboðnum. 29. juni fer Kasparov sostatt at telva simultantalv ímóti Sting og hansara fólki. Fái meir at vita á heimasíðuni hjá Kasparov, www.kasparovchess.com sum eisini fer at vísa talvið millum Sting og Kasparov beinleiðis.



# Nú eru argajamenn fremstir

*3. deild: FS Vágar fekk ikki mannað lið á Sandi, og leygardagin verður toppuppgerð í Gundadali*

Fyrir fyrstu ferð í ár tapti B36. AB vann á heimavølli móti B68, og tað hevði við sær, at argjamenn í stigum komu upp á síðuna av B36. AB hevur betri málmun, og tað vil siga, at teir kunnu sóla sær á ovasta plássinum. Tað fara teir at gera í hvussu so er inntil leygardagin. Tá skulu teir heim til Havnar at spæla móti B36.

Talan verður um endurtøku av finaluni í 4. deild í fjør. Ta ferðina vann B36 5–3 eftir longda leiktíð. Bæði liðini fluttu upp í 3. deild.

Støðan í fótbóltinum í Vágum er ikki akkurát tann, sum teir høvdu ætlað og roknað við. Sunnudagin var FS Vágar á Sandi, men tað var bara besta liðið, sum spældi. Vágamenn boðaðu frá, at teir ikki fingu mannað næstbesta liðið, og so var eingin dystur í 3. deild. Ásetingarnar hjá FSF siga, at í sovornum førum verður liðið, sum ikki møtir, sektað við bót. B71 vinnur tey trý stigini við málmuninum 0–0, og ivaleyst eru allir partar sera harmir um, at tað framvegis kemur fyri, at lið ikki megna at møta.

Tað er tætt millum liðini. Tað sæst aftur í, at eitt gott ella vánaligt úrslit hevur við sær, at liðini flyta langt upp ella niður á støðutalvuni.

Merkisvert er tað, at eftir sigurin á norðoyarstevnu kom TB upp á triðja pláss. Tvørámenn hava einki ímóti at vinna bronsu. Men teir eru bangnir fyri at koma í uppflytingarvanda, sum teir sjálvir orða tað!

**AB–B68**

Argjamenn siga, at teir fingu størri mótstøðu, enn teir hava fingið flestu ferðirnar í ár. Spælbýtið var rættuliga javnt, men heimaliðið hevði fleiri upplagdar møguleika at skora, enn gestirnir høvdu.

Jákup Olsen setti hol á fyri B68, men undan steðginum javnaði Svend Poulsen, eftir at B68, sum ikki tóktist hava somu konditiónina sum mótstøðumenninir, hevði mist á miðjuni. Toftamenn gjørdu sjálvmál tíðliga í 2. hálvleiki, og so stútaði aftasti B68 maðurin, Oddmar Andreasen, hornasparksinnlegg í málið.

Toftamaðurin á AB liðnum, Signar Johannesen, skoraði sigursmálið. Miðvallarin fór sjálvur gjøgnum verjuna og setti bótlin framvið Eyðuni Petersen í B68 málinum.

**Skála–B36**

Fyrsti ósigurin hjá B36 kom á Skála, har heimaliðið tykist hava fingið betri tak á tí, enn teir høvdu fyrstu umførini. Regin Arge hjá B36 varð rikin av vøllinum miðskeiðis í 1. hálvleiki. B36 menninir vóru misnøgdir við dómin, men svartklæddi maðurin helt taklingina hava verið so ógvusliga, at ostaskorpan skuldi upp í leikin.

Í 1. hálvleiki hevði Regin Arge ein góðan fluktara, áðrenn hann fór av vøllinum, men bólturin fór uppum. Marius Joensen hjá Skála hevði opið mál eftir misskiljing millum miðverju og málverja, men í síðstu løtu kom eitt B36 bein í vegin.

Einasta málið skoraði spælandi venjarin hjá Skála, Kaysten Rasmussen. Hann var fyrstur á, eftir at eitt gott langskot hevði tikið samankomingina.

**KÍ–TB**

Talan var um fyrsta útisigurin hjá TB í fleiri ár, og talan var um fyrsta heima ósigurin hjá KÍ í ár. Klaksvíkingar vóru illa fyri at spæla norðoyarstevnudyst. Teir høvdu akkurát ellivu spælarar, og síðsta korterið spældu teir við níggju monnum. Bæði Heri Hendriksen fór av vøllinum við reyðum korti, og Louis Balsa sá tvær ferðir gult.

Kaj Roest kom langt upp á skjúttaralistan, og um tvørámenn høvdu verið meiri nærlagdir í 2. hálvleiki, so kundu teir bøtt uppaftur meiri um málmunin.

**VB–ÍF**

95 ára føðingardagurin hjá Vágs Bóltfelag var hildin við manér. Teir høvdu sett steyp æut at kappast um, og bæði í 1. og í 3. deild vóru teir so óbesketnir, at teir vunnu steypini sjálvir.

Fuglfirðingar eru langt frá tí styrki, sum teir áður hava víst í 3. deild. Komandi leygardag fáa teir nýggjan møguleika í Vágum – um FS Vágar fær mannað lið – meðan VB fær munnin fullan, tá teir skulu spæla á Toftum.

JH

**Úrslit**

7. umfar

**B71–FS Vágar**

FS Vágar møtti ikki

**AB–B68 3–2 (1–1)**

0–1: Jákup Olsen 5.
1–1: Svend Poulsen 36.
2–1: sjálvmál 48.
2–2: Oddmar Andreasen 53.
3–2: Signar Johannesen 73.

**Skála–B36 1–0 (0–0)**

1–0: Kaysten Rasmussen

**KÍ–TB 2–9 (0–3)**

0–1: Eyðun Svalbard 15.
0–2: Kaj Roest 35.
0–3: Just Johannesen 36.
0–4: Eyðun Svalbard
0–5: Kaj Roest
0–6: Kaj Roest
1–6: Bárður Andreasen
2–6: Louis Balsa
2–7: Jóhannes Johannesen
2–8: Jóhannes Johannesen
2–9: Kaj Roest

**VB–ÍF 4–0 (2–0)**

1–0: Marner Richard 25.
2–0: Egil Steintórsson 33.
3–0: Rógvi Thorsteinsson 65.
4–0: Hans Pauli Dahl 80.

**8. umfar**

leygardagin 10. juni
FS Vágar–ÍF
B68–VB
B36–AB
TB–Skáli
B71–KÍ

## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Oddbjørn Joensen, | AB | 9 |
| Signar Johannesen | AB | 7 |
| Kaj Roest | TB | 7 |
| Egil Steintórsson | VB | 7 |
| Kári í Lágabø | VB | 6 |
| Aksel Højgaard | B68 | 5 |
| Eyðun Svalbard | TB | 5 |
| Svend Poulsen | AB | 4 |
| Regin Arge | B36 | 4 |
| Dánial P. Johansen | B36 | 4 |
| Petur Niclasen | FS Vágar | 4 |
| Aksel Johannesen | KÍ | 4 |
| Just Johannesen | TB | 4 |
| Vinjard Guttesen | B36 | 3 |
| Tummas Eli Hansen | B36 | 3 |
| Jóannes Jakobsen | B68 | 3 |
| Páll á Reynatúgvu | B71 | 3 |
| Kristoffur Vidtfeldt | B71 | 3 |
| Jákup Baldvinsson | ÍF | 3 |
| Hallur Christiansen | TB | 3 |
| Niels Gunnar Petersen | TB | 3 |

## Støðan, 3. deild menn

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | AB | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 35 | 12 | 23 | 18 |
| 2 | B36 | 7 | 6 | - | 0 | - | 1 | 25 | 5 | 20 | 18 |
| 3 | TB | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 29 | 20 | 9 | 11 |
| 4 | Skála | 7 | 3 | - | 1 | - | 3 | 13 | 15 | -2 | 10 |
| 5 | B71 | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 12 | 19 | -7 | 9 |
| 6 | VB | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 20 | 29 | -9 | 9 |
| 7 | KÍ | 7 | 3 | - | 0 | - | 4 | 17 | 37 | -20 | 9 |
| 8 | B68 | 7 | 2 | - | 2 | - | 3 | 19 | 17 | 2 | 8 |
| 9 | ÍF | 7 | 2 | - | 0 | - | 5 | 15 | 26 | -11 | 6 |
| 10 | FS Vágar | 7 | 1 | - | 1 | - | 5 | 12 | 17 | -5 | 4 |

# KÍ tók við

*KÍ kærir ikki dómin í málinum um sligna hjálpardómaran*

Jákup Mørk

Á fundi í gjár gjørdi nevndin í KÍ av, at taka við dóminum, sum kappingarnevndin hjá FSF feldi, eftir at linjudómari varð sligin í búkin.

**Hyggja frameftir**

Svend Jacobsen, formaður í KÍ, sigur við Sosialin, at nevndin í felagnum hevur valt, ikki at gera meira við málið, og istaðin líta frameftir.

At FSF hevur gjørt av, at trygdartiltøkini, sum annars verða galdandi frá 1. august, longu skulu galda í Klaksvík frá 18. juni, leggur formaðurin ikki so nógv í.

- Hjá okkum eru so at siga øll krvøini uppfylt frammanundan, so nú er bara at gera trygdargeira frá skiftirúminum inn til vøllin.

Formaðurin hjá KÍ endar annars við at siga, at teir eru bara glaðir um, at málið nú er avgreitt, soleiðis at sleppast kann víðari.

# Bara javnleikir

*Hjá føroysku leikarunum endaði alt við javnleiki, tá 6. umfar í íslendsku kappingini varð leikt týsdagin*

Jákup Mørk

Fult umfra var í íslendsku kappingini týskvøldið, og føroysku leikararnir, sum royna seg í kappingini, fingu eitt stig hvør.

Allan Mørkøre og ÍBV leiktu á útivølli móti ÍA, har Uni Arge framvegis ikki er tøkur. Dysturin endaði málleysur, og skuldi nakar vinnari verið, áttu stigini helst at verið eftir á Akranesi. Eins og hann gjørdi í Føroyum í fjør, eydnaðist tað nevnliga Birkiri Kristianssyni at verja fyri brotssparki, og á tann hátt tryggja, at annað stigið kom heim aftur til Vestmannaoyggjarnar.

**Eisini málleyst**

Leiftur átti heimavøll móti Grindavík, og heldur ikki í hesum umfarinum eydnaðist tað føroyingunum á Ólafsfirði at fáa ein sigur til høldar. Sámaa Joensen fær gott skoðsmál í Íslendska Morgunblaðnum, og yvirhøvur sigst at Leiftur hevði meiri spæl. Mál komu tó eingi, og Leiftur hevur sostatt framvegis fyrsta sigurin til góðar.

**Betri hjá Páll**

Gongst ikki so væl hjá føroysku leikarunum, so eru glottar kortini at hóma. Páll Guðlaugsson og Keflavík vunnu nevnliga týdningarmiklan 1-0 sigur á Stjarnuni, sum er niðasta liðið í íslendsku landssímadeildini.

Við sigirinm togaði Keflavík seg upp á triðja plássið, eitt stig framman fyri ÍBV, men tvey stig aftan fyri oddaliðið, KR.

**Úrslit:**

| | | |
|---|---|---|
| 06.06 | ÍA-ÍBV | 0-0 |
| 06.06 | Fram-Fylkir | 1-2 |
| 06.06 | Keflavík-Stjarnan | 1-0 |
| 06.06 | Leiftur-Grindavík | 0-0 |
| 06.06 | Breiðablik-KR | 1-2 |

| | Støðan | d | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KR | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 8 | 4 | 4 | 12 |
| 2 | Fylkir | 5 | 3 | - | 2 | - | 0 | 11 | 4 | 7 | 11 |
| 3 | Keflavík | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 7 | 9 | -2 | 10 |
| 4 | ÍBV | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 10 | 3 | 7 | 9 |
| 5 | Grindav. | 5 | 2 | - | 3 | - | 0 | 6 | 2 | 4 | 9 |
| 6 | ÍA | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 2 | 3 | -1 | 7 |
| 7 | Fram | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 4 | 8 | -4 | 4 |
| 8 | Breiðabl. | 5 | 1 | - | 0 | - | 4 | 7 | 11 | -4 | 3 |
| 9 | Leiftur | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 3 | 9 | -6 | 2 |
| 10 | Stjarnan | 5 | 0 | - | 1 | - | 4 | 1 | 6 | -5 | 1 |